## DAGSINS MEINING

# Partapolitikkur

Tjóðveldisflokkurin hevur eftir øllum at døma ein sannleika, meðan onnur renna runt í partapolitiskum tvassarίi fyri at brúka vendingina hjá formanni floksins. Vit síggja, hvat hesin sami flokkur ger, tá hann er við til at skipa fyri ráðstevnum. Meðan Grønland og Danmark eru umboðað av fleiri politiskum flokkum, herundir Javnaðarflokkunum, so sleppur Tjóðveldisflokkurin einsamallur at leggja føroysk sjónarmið fram á ráðstevnu á Christiansborg um ríkisfelagsskapin í næstu viku. Vit vita øll, hvat Tjóðveldisflokkurin meinar um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum, og tað sær ikki mætari út, enn at hann hevur tryggjað seg móti "partapolitiska tvassarínum" við einsamallur at umboða føroyingar á hesi annars áhugaverdu ráðstevnu.

Formaður Tjóðveldisfloksins vísir vantandi forstáilsi av búskapi, tá hann rør uppundir, at ein búskaparligur sannleiki finst, meðan partapolitikkur skal haldast uttanfyri fíggjarlógarviðgerðina. Tað finst ikki ein sannleiki í búskaparpolitikki. Tað finnast økonomiskar teoriir, ið spenna frá marxistiskari teori til Keynesianskan blandingsbúskap víðari til nýliberalistiska Friedman við einari ørgynnu av teorium ímillum. Tað vildi verið púra burturvið, um partapolitiskir munir ikki komu til sjóndar undir einari fíggjarlógarviðgerð. Her burdi Tjóðveldisflokkurin serliga bitið merki í, at Javnaðarflokkurin, tann flokkur, ið traditionelt hevur verið lagdur undir at vilja stóran almennan sektor, hevur gjørt vart við, at umsitingin er vorðin alt ov dýr. Tað átti at fingið formann Tjóðveldisfloksins at hugsað seg um, heldur enn at kveistra konstruktivan og sakligan kritikk burtur við banniorðinum "partapolitikkur".

Fíggjarlógaruppskotið er ikki væl frágingið. Hetta hava vit fingið váttað av garvaðum politikarum eins og búskaparfrøðingum. Tað er spell, tá formaður Tjóðveldisfloksins ikki tekur hetta til eftirtektar, men heldur roynir at verja ófantaligheitir, sum til dømis tá fíggjarmálaráðharrin við onkrari tekniskari finnesu roynir at halda lógarfestu útreiðslurnar til Norðoyartunnilin uftanfyri fíggjarlógina fyri 2003.

Tað er einki galið við, at partapolitiskt kjak fer fram á politiska vígvøllinum. Tað er ein sunnur og náttúrligur partur av einari demokratiskari skipan, hóast hetta eftir øllum at døma ikki hóvar formanni Tjóðveldisfloksins.

Tað sær løgið út, tá Høgni Hoydal roynir at diskvalificera ein búskaparfrøðing úr almenna kjakinum, tí hesin hevur verið valevni hjá einum ávisum flokki. Álvaratos, skal ein persónlig politisk meining gera tað, at man ikki má úttala seg á sínum fakøki. Tað er malplaceraður partapolikkur, tá man roynir at miskreditera fakfólk vegna politisku meining teirra, og tað eiga allir politiskir flokkar at taka kraftiga avstand frá.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Rebekku

**Marjun Vang**

Hetta er bert ein lítil viðmerking frá einari gentu, ið hevur nøkur fleiri ár og erfaringar á baki enn Rebekka R. Petersen.

Eg má viðganga, at eg gjørdist heldur bilsin, tá ið eg las lesarbrævið hjá Rebekku í Sosialinum 25. oktober 2002.

Tað kann vera, at tú Rebakka hevði doyð av skomm høvdu foreldur tíni verið samkynd. Kanska kemur hesin hugburður av, at tú í tíni kristnu uppaling hevur lært, at tað at vera samkynd/ur er synd. Sjálv eri eg eisini uppald í tí kristnu trúnni, men munurin á okkara uppaling er, at eg havi lært, at ein skal virða og góðtaka øll menniskju. Tað er líkamikið, hvat kyn foreldrini eru. Tað, ið umráðandi er, er at barnið kennir seg elskað av foreldrum sínum.

Tú sigur, at tað at vera samkynd/ur er synd. Men eg trúgvi neyvan, at nakar velur at verða útstoytt/ur og niðurgjørd/ur vegna seksualitet teirra. Hetta er heilt burturvið! Eingin velur at vera noydd/ur at flyta frá móðirlandi sínum fyri at fáa eitt sámuligt lív, har tey ikki verða dømd hvønn tann einasta dag.

Tað er stór skomm, at ein bólkur í okkara samfelag er noyddur at flyta, tí hann er uttanfyri og øðrvísi. Og tú sum ert so flóv av øllum, átti heldur at skammast yvir at liva í einum landi, ið ikki hevur pláss fyri øllum fólkum, óansæð húðarlit, trúgv og seksualitet.

Eg haldi, at tað er upp á tíðina, at vit føroyingar læra at góðtaka og virða samkynd, tí tey hava akkurát líka góðan rætt til at vera her sum vit onnur.

Tað er ei heldur okkara uppgáva at døma onnur, tí tað er Guð, ið dømir okkum øll tá ið tann dagurin kemur.

# Dygt diplomatiskt virksemi meðan Irak-kanningin dregur út

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður av ST-borgini í New York*

**RØÐURNAR HAVA VERIÐ NÓGVAR Í TRYGDARRÁÐNUM FRÁ YMISKUM LONDU. ÁHUGAVERT ER AT SÍGGJA INNIHALDIÐ. ALLIR YNSKJA AT RØKKA MÁLINUM, MEN ÚTGANGSSTØÐIÐ ER ÓTRÚLIGA YMISKT.**

Millum oddafólk í ST verður hildið, at kanningarleiðarin, sviðin, Hans Blix fær eina sera torføra uppgávu at loysa, tá hann endiliga sleppur til verka við kanningini av goymslunum av hópoyðingarvápnum í Irak.

Í fyrstu atløgu, um vápn verða funnin, eftir at Irak hevur lagt doyðin á, at eingi vandamikil vápn eru, verður trýstið stórt, av tí at alt ST tá er hildið fyri gjøldur.

Í øðrum lagi, um einki verður funnið, er misálitið greitt av kanningararbeiðinum frá teimum londum, sum hava sligið fast, at hópoyðingarvápn eru í landinum.

Álitið á Irak, burtur sæð frá nøkrum heilt fáum londum, er so gott sum einki.

**BRETAR OG FRANSAR**

Bretski ambassadørurin, Jeremy Greenstock, tekur til í røðu síni, at *"vit kunnu ikki góðtaka at hava kanningarfólkið aftur standandi hjálparleyst, meðan óhugnalig skjøl verða brend ella meðan ein mongd rýmur frá bakdyrnum, tá kanningarfólkið er til reiðar við høvuðsdyrnar"*.

Franska umboðið, Jean-David Levitte, sum hevur fremstu virðing í øllum londum, er nakað varisligari, og tekur til, at: *"Hóast Frakland ikki hevur fullgóð prógv fyri, at ólóglig vápn eru í Irak, eru tað nógvar indikatiónir um, at Irak hevur brúkt hesa støðu til at fremja ólógligu skipanir teirra, innan kemisku og biologisku økini"*.

**DRIGIÐ LONGUR ÚT ENN VANLIGT**

Ringt er í skrivandi løtu at siga, um nakað verður greitt í hesari vikuni.

Fleiri diplomatar meta, at málið kann gott draga út í komandi viku. Lagt verður afturat, at fáir kenna til mál í Trygdarráðnum, sum hava drigið so langt út.

Sum sagt, er ilt at siga í skrivandi løtu, hvat úrslitið verður.



Tikið verður til millum manna á ST-borgini, at gløgt hevur USA lagt út - nakað harðliga og nakað klossut heldur onkur - vitandi, at teir fingu ikki alt.

Sagt verður eisini, at bretsku umboðini, sum sigast at hava heimsins dugnaligastu uttanríkístænastu, sita nú og velja orðafelli, orða og orða um í innihaldinum av samtyktarinnihaldinum.

Frakland kanska er í løtuni sett á eitt síðuspor saman við Russlandi. Møguliga er umboð Russlands ikki samt við stjórnina.

**SPURNINGUR UM ATKVØÐUGREIÐLSU**

Verður atkvøtt um málið í Trygdarráðnum, fær tað helst 9 av 15 atkvøðum í ráðnum.

Syria atkvøður helst ímóti, meðan Frakland og Russland møguliga finna uppá at nýta veto- ella sytingarrættin. Spurningurin er so, um hesi lond "verða roknað sum heimsveldi".

Onkur hevur tikið til, at USA OG Bretland - Bretland hevur ikki givið endaligt svar uppá seinasta innihaldið hjá USA - fáa ikki alt sítt, men samtyktin liggur nakað ímillum tað franska og ameriska.

Spurningurin er tí, um talan verður um eina ella tvær samtyktir ella, at nakað verður valt har ímillum. T.v.s. sum tikið verður til her, " eina, tvær ella hálvonnur".

Eingin ivi er í, at fyrsta uppskotið hjá USA og Bretlandi er nakað "uppbloytt", sum dagarnir eru gingnir.

**ALLIR GÓÐIR HEILSAR Í ST**

Ja, nógv verður nú ferðast millum londini á ST-borgini, dygt diplomatiskt virksemi fer fram í hesum døgum, har allar frægastu og mest skynsomu kreftirnar samvirka í einum næstan vónleystum máli.

Røðurnar hava verið nógvar úr ymisku londunum, og áhugavert hevur verðið at sæð innihaldið í ymisku røðunum. Allir ynskja at røkka málinum, men útgangsstøðið er ótrúliga ymiskt.

Hetta er støðan í skrivandi løtu.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Nýggj vitan áðrenn nýggja kanning



*Hermann Oskarsson*

Undir kreppuni vórðu settar í verk nakrar bráðfeingis analysur av føroyska búskapinum IMF og Gørtz rapportirnar. Eftir kreppuna eru tvær nakað sama slag analysur framdar - Caragata og Hvítabók.

Allar hesar hava verið analytisk verk, grundað á ta informasjón, sum liggur til taks frammanundan.

Hesi tiltøkini hava givið okkum nakrar meiningar um føroyskan búskap - men ikki stórvegis av nýggjari vitan ella nýggjum amboðum.

Tað er ótrúliga arrogant, at fara frá hesari hendingini, uttan at syrgja fyri, at hava fleiri amboð og meira vitan tøka. At stevna út í mjørkan enn eina ferð.

Hesar nevndu frágreiðingar geva á ongan hátt myndugleikunum betri førleika ella meira informasjón til at reka búskaparpolitikk ella til at hava eftirlit við búskapargongdini.

Tað, sum krevst er:

– Informasjón um búskapin og sosialu viðurskiftini - bæði umfatandi árliga informasjón og bráðfeingis fráboðandi hagvísar
– Amboð og stovnar til analysur

At krepputilgongdin kundi búnast so nógv áðrenn gjørt var av álvara vart við viðurskiftini, stóðst fyrst og fremst av, at ov lítil informasjón var um føroyska búskapin og at informasjónin ikki kom nóg tíðliga. Í hesum er alt ov lítið broytt.

Haraftrat komst tað av, at fakligi førleikin til at brúka informasjónina ikki var nóg góður.

Nú, vit merkja fyrstu skvatlini at einari nýggjari kreppu, hava vit framvegis ikki neyðugu informasjónina ella neyðug amboð ella førleika til at brúka informasjónina.

Okkum manglar haldgóð hagtøl um nærum alt.

Mest átroðkandi eru haldgóð og stundislig hagtøl um tjóðarroknskap, gjaldsjavna, prís- og lønargongd, arbeiðsmarknað, húsarhaldsinntøkur og sosial viðurskifti annars, fíggjarviðurskifti og fíggjarmarknað.

Tínæst hagvísar av ymsum slag - um framleiðslu, keyp, bygging, íløgur, eftirspurning og útboð av arbeiðsorku.

Nú ein dagin kom ein áheitan um at fáa onkra útlendska nevnd at kann føroyska búskapin enn einaferð - og aftur við atliti til teir brennandi politisku spurningarnar.

Kanningar av hesum slag eru altíð vælkomnar. Tað verða valla nakrantíð gjørdar ov nógvar av slagnum. Men hetta er sum við oljuleiting - at seta seg at analysera tær somu upplýsingarnar fimm ferðir, er ikki rætti mátin. Tú granskar tær fystu upplýsingarnar og so noyðist tú at skjóta seismikk aftur. So granskar tú tær upplýsingarnar. Síðani skal royndarborast og tær upplýsingarnar kannast. Nýggjar boringar til avmarking, nýggjur seismikkur, royndir aðrastaðni - alt nýggj informasjón, sum skal til. Heldur enn at seta seg at gronast uppi yvir tí fyrstu seismikkskjótingini fimm ferðir á rað. Tað nyttar lítið.

Ikki tí at tað ikki kundi verið hugnaligt, men av tí orsøk, at okkum fyrst og fremst tørvar informasjón - grundleggjandi teljing og hagtalsliga uppgerð - áðrenn tað nyttar at gera fleiri kanningar og fyri at myndugleikar og fólk skulu hava ein livandi kjans at fáa fráboðan um tað sum hendir nú, tað sum hendi í gjár og tað sum kanska fer at henda í morgin.

Um so er, at tað skulu gerast fleiri kanningar av føroyska búskapinum, so vil eg so staðiliga mæla til, at teir pengarnir verða brúktir til at styrkja førleikan her á landi til gransking av búskapi og sosialum viðurskiftum. Og um tað so endiliga skal vera útlendskt ella altjóða, fáið so sett hesar serfrøðingar í samstarv við føroyingar og føroyskar stovnar.

Landið hevur sett eitt Búskaparráð og hevur Hagstovu, Landsbanka og Fíggjarmálaráð. Fáið heldur brúkt orkuna til at styrkja førleikan hjá teimum til at fáa hagtøl og uppgerðir til vega og til at menna førleikan og amboðini til regluliga analysu av teimum viðurskiftunum, vit ferðast ígjøgnum.

Tann fíggjarmarknaðarliga "ratingin" ella vigingin, sum Sigurð Poulsen hevur nevnt, er eitt heilt annað mál. Hon hevði verið eitt frálíkt høvi hjá føroyskum myndugleikum at sloppi upp á vektina eina ferð um árið, fyri at tryggja sær at vektin samsvaraði við útsjóndina.

Dagsins rættur eitur informasjón.

Omaná er skilagóð tilfeingisnýtsla.

Í løtuni hava vit nógv meira brúk fyri regluligari informasjón enn vit hava brúk fyri einari frágreiðings aftrat um føroyska búskapin.

Ráðini eru: Syrgið fyri at fáa røttu informsjónina rættstundis.

Tað er ikki bara í samfelagsbúskapinum, at tørvur er á at savna tøku informasjónina til nyttugar uppgerðir og at økja nøgdina av tøkari informasjón. Hetta er galdandi fyri alt samfelagið, øll landsstýrisráðini, allar avgerandi stovnar, øll sosial og búskaparlig viðurskifti, umhvørvi og fiskatilfeingi.

Sjálvt einfalda teljing av fiskiskapi og fiskivinnu manglar okkum, skomm at siga frá. Vit hava onga beina og fullfíggjaða uppgerð av føroyskum útflutningi. Vit kenna ikki tænastuhandilin við onnur lond. Vit vita ikki hvussu nógv húsarhald eru í landinum og vit vita tíansheldur nakað um tey. Vit vita ikki um tímalønin fer upp ella niður. Er bygging dýr ella bílig? - vit vita tað ikki. Eru føroyingar væl útbúnir? - vit vita tað ikki. Vit vita heldur ikki um fyritøkunum manglar arbeiðsfólk ella hvørja útbúgving fyritøkurnar vilja hava.

Hagstovan megnar at framleiða árligan tjóðarroknskap - tvey ára gamlan. Tað vil siga at kunngjørt verður um ársskiftið 2002/2003 hvussu árið 2000 hilnaðist. Tá er tað søga og ikki ein uppgerð, sum er brúkilig hjá myndugleikum ella almenningi.

Tann tjóðarroknskapurin er í ársins prísum - altso prísunum frá 2000. Næsti tjóðarroknskapurin er so fyri 2001. Kemur út um ársskiftið 2003/2004 og er í ársins prísum - altso prísum frá 2001. Av hesi orsøk kunnu tjóðarroknskapirnir fyri 2000 og 2001 ikki samanberast. Vit vita ikki um tað gekk fram ella aftur frá 2002 til 2003 ella hvussu nógv tað gekk fram ella aftur millum árini.

Til tess krevst tjóðarroknskapur í førstum prísum.

Til at gera informasjónina frá tjóðarroknskapi brúkiliga hjá myndugleikum og almenningi krevst haraftrat at informasjónin er tøk fyrr enn tvey ár eru farin - nógv fyrr. Tað rætta var, at fyribils tjóðarroknskapur lá tøkur 6 mánaðar eftir árslok - ikki seinni. Rættast var eisini um tjóðarroknskapur fyri ársfjórðingarnar kom út so hvørt árið leið.

### Upp úr mjørkanum

Tað sýnist sum dámar okkum best at liva í mjørka. At hava meiningar um at hetta ella hitt er tað rætta - tó helst undir tí fortreyt at vit ikki hava nóg mikið av informasjón til at ivast í tí vit halda.

Uttan mun til um tað er hendan meiningin ella hin - tað sum telir er vitan. Vitan, sum setir teg føran fyri at taka hesa ella hasa støðuna - ikki støðutakan, sum setir teg føran fyri at køva vitanina um veruleikan.

Dysturin millum politiskar meiningar er upp á sín máta ein av motorunum, sum ber okkum framá. Men ikki tá meiningarnar eru grundaðar á heilaspuna. Okkum tørvar vitan, informasjón, til at lyfta meiningarnar upp á ein hóskandi pall - ein pall har útsýnið er betri - omanfyri mjørkan.

# Ginusøgur og samkynt



*Oddfríður Marni Rasmussen*

Eg skilji á øllum brøgdum, at smáligheitirnar aftur hava verið í hásætinum. Eg havi verið burturstaddur í tríggjar vikur, og tí havi eg ikki fylgt so væl við í kjakinum, men eg skilji at krympireyvarnar aftur hava úttalað seg um hugtøk, sum tær ikki hava skil fyri - og í hesum førum er tað leikurin Ginusøgur og náttúrligur/ónáttúrligur seksualitetur.

Leikurin er sera skemtiligur og sera tragiskur, tí at hann nemur við nøkur tabuevni, ið vanliga verða sópa undir húsateppið sum almenn teppið. Hetta vælsignaða orðið VAGINA, er nakað galið við tí? Nei og jú. Eve Ensler gevur vaginuni lív, ger hana til eina hugsandi gøgn, eina talandi gøgn, og tað er tað sama sum verður sagt um eitt hjarta - at eitt hjarta hugsar, talar, er rationelt. So reint logiskt eru bæði ósonn. Ein vagina kann ikki snakka, hugsa, rópa og tað kann eitt hjarta heldur ikki, men fyri at sleppa undan at siga tað vit sjálvi hugsa, so geva vit øðrum kropslutum, enn heilanum, eina rødd. Ginusøgurnar er ein forsvarstala um eitt tabuevni, eins og kjakið um samkynd er vorið ein forsvarstala um Guds orð og ein menniskjaligan rætt at vera sum tú nú einaferð er. Ginusøgurnar enda við einari talu um hjarta og vaginuna. Vaginan fyrigevur, hon opnar seg, tekur ímóti, eins og hjartað ger tað, men vaginan kann nakað, sum hjartað ikki kann, og tað er at geva lív - hetta náttúrliga, at føra ættina víðari.

Í kjakinum, sum eftir mínum tykki er á so lágum støði, verður tosa um tað náttúrliga og tað ónáttúrliga. At vera samkyndur, verður lýst sum nakað ónáttúrligt. Eg kenni nógv samkynd og eg síggi tey sum minst líka náttúrlig sum tey, ið ikki eru tað. Men fyrst, hvat er náttúrligt og hvat er ónátturligt. Náttúrligt, tað vil siga at tað finst í náttúruni, og vit eru ein partur av náttúruni. Áðurnevnda føðing er náttúrlig, at drepa er náttúrligt (tí tað verður gjørt í náttúruni). Ónáttúrligt er at gera reagensglasbørn, at svimja á vágni hvønn morgun árið kring, at fáa nýtt hjarta og at flúgva upp á mánan. Skulu vit sleppa øllum vísindaligum framstigi, bara tí at hetta ikki er náttúrligt? Nei, tað haldi eg ikki.

Vit hava skapt okkara egnu náttúru, sum eitur sivilisatiónin, og hon er ikki komin av sær sjálvari. Her er tað náttúrliga og tað ónáttúrliga runnið saman. Í einum siviliseraðum samfelag er tað náttútligt at vera samkyndur, at vera menningartarnaður, at vera sinnissjúkur tí at samfelagið eigur at geva hesum sømdir at liva sum menniskju.

Fyri einum túsund árum síðani vóru politikkur og átrúnaður tengd at hvørjum øðrum. Síðani kom humanisman uppí leikin og skilti hesi bæði at. Politikarar vórðu fólkavaldir; demokratiið kom uppí leikin, meðan átrúnaður handlaði um persónligar sannføringar. Í Føroyum vísir tað seg, at humanisman ikki hevur megnað at skilt hesi at. Politikarar, serliga í Miðflokkinum og í pørtum av Fólkaflokkinum taka sínar avgerðir útfrá einum sokallaðum "kristiligum grundarlagi." Tað eru menniskjarættindini hjá Amnesti International eisini, og har stendur í grein 18 at "Øll hava rættin til tanka-, samvitsku- og trúðarfrælsið." Og í grein 19 at "Øll hava rættin til egnu meiningar, talu- og skrivifrælsið." Vit kunnu ikki kasta øll hesi rættindi fyri borð, tað er upp til landsins kosnu menn at verja rættindini hjá øllum: kristnum, samkyndum, ginufjepparum, gudsnoktarum, orðblindum, stamarum, teimum sum sita í koyristóli, sinnisveikum, barnakonum, børnum, ja, øllum sum í samfelagnum liva. Vit eru øll so ymisk, hava øll okkara veikleikar og styrki, men vit mugu ikki brúka veikleikarnar at vísa á okkara styrki, heldur brúka styrkina at vísa á veikleikarnar.

Eg kann siga eina lítla søgu móti endanum. Eg var í kirkju í Reykjavík, har ein svenskur prestur helt eina prædikku um ein transvestitt úr San Francisco, ið var komin illa fyri. Hann prostitueraði seg, var rúsevnismisnýtari, tá ið ein amerikanskur prestur tók henda persónin til sína meinigheit, hjálpti honum burturúr rúsevnismisnýtsluni, men lat hann vera transvestit. Persónurin gjørdist hjálpari í meinigheit hansara. At enda segði tann svenski presturin, at óansæð hvussu vit menniskju uppfata hvønn annan, so eru vit eins í Guds eygum. Eg hugsaði við mær sjálvum tá ið fór út aftur, "Hví hava vit ikki ein sovorðnan Gud í Føroyum, sum ikki sær mun á hvussu menniskjan er samansett." Meir eg hugsaði um hetta varnaðist eg, at vit kanska hava ein slíkan Gud, men vit hava bara nøkur menniskju, sum hála partar av bók hansara og brúka teir til at gera samfelagið einshugsandi, einstrúgvandi og einslitt. Hesi eru so upptikin av at hugsa um sína egnu støðu eftir deyðan, at tey gloyma at verja menniskju hvussu ymisk tey nú einaferð eru. Hetta sæst aftur í kjakinum. Ginusøgurnar eru ein framúrskarandi leikur, vælspældur eisini, um kvinnulagnur, sum til dømis neyðtøkur, lesbiskar upplivingar, upplivingar saman við manni, um seksualitet í breiðum týdningi. Allar kvinnur hava eina ginu og tað eigur ikki at vera nøkur skomm, meðan ein út av tíggju eru samkynd, so vit áttu øll at verið so heldig at kent ein samkyndan. Tíggju prosent, tað eru knappir fýra tingmenn.